# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Fríða Patursson 50 ár



Týsdagin 28. februar fyllir Fríða Patursson í Havn 50 ár. Fríða er løgfrøðingur og starvast á Advokatskrivstovuni í Fr. Petersensgøtu. Har hevur hon arbeitt, síðani hon varð liðug at lesa í 1982.

Fríða er ættað úr Kirkjubø, har forfedrar hennara í fleiri lið hava livað av urtagarðsbrúki, sum man vera eindømi í Føroyum. Foreldrini, Sámal og Elisabeth Patursson, eru kend víða um sum vinsæl fólk, og hetta lyndið hevur Fríða arvað frá teimum.

Tá Fríða ikki er til arbeiðis, syngur hon í kórinum Sólarmagn á Velbastað. Familjan brúkar eisini nógva tíð í húsunum í Sørvági.

Fríða hevur fleiri álitisstørv og millum hesi telist, at hon er formaður í nevndini fyri Føroya Barnaheim.

Hon er gift við Niclasi Rasmussen, og børnini eru: Rúna, Elisabeth, Rósing og Sámal.

Vit ynskja Fríðu hjartaliga tillukku við føðingardegnum.

**Starvsfólkið**

## Fyrsti rundtúrur við ferðafólkum

Nakrir gestir, sum komu við Norrønu á veg til Íslands, teknaðu seg mánamorgunin til ein rundtúr í Tórshavn og á Argjum. Tey vóru úr Russlandi, Týsklandi, Svørríki og Mexiko. Ikki kann sigast annað enn, at tað var ein altjóða bólkur við fleiri tungumálum. Sámal Bláhamar, frá Toru Tourist Traffic, sigur, at tað er sera hugaligt, at vit longu í februar hava gestir, ið koma við á rundtúrar so tíðliga á árinum.



*Sámal Bláhamar frá Toru Tourist Traffic saman við útlendsku ferðafólkunum*




## Almenn móttøka

Í sambandi við at Kommunusamskipan Føroya og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya eru flutt í nýggj hølir og Barnaverndarstova Føroya er sett á stovn, verður almenn móttøka í hølinum í R. C. Effersøesgøtu 30, Tórshavn.

**Fríggjadagin 3. mars 2006 kl 14 – 16**

Kommunusamskipan Føroya
Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya
Barnaverndarstova Føroya


**Dagurin í morgin**

**1. mars. Albinus**, deyður ár 550. Abbati og biskupur í Angers í Fraklandi. Varð stutt eftir deyða sín skírdur halgimenni. Navnið merkir hvítur.

i
Sosialurin

†

## Andlát og jarðarferðir

Jarðarferðin hjá **Liss Knudsen** verður úr Elim týsdagin 28. februar, kl. 13. Tey, ið vilja minnast Liss, kunnu lata eina peningagávu; konta í Føroya Sparikassa.

Kistan við **Dánjal P. Nielsen, Klaksvík**, fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi týsdagin 28. februar, kl. 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni mikudagin 1. mars, kl. 13.30.

Kistan við **Emmu á Hvítanesi** fer frá Kirkjugarðskapellinum týsdagin 28. februar, kl. 13.

Kistan við **Jan í Eyðansstovu í Sandavági** fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum týsdagin 28. februar, kl. 17. Jarðarferðin verður úr Sandavágs Kirkju mikudagin 1. mars, kl. 13. Tey, ið vilja minnast Jan, kunnu lata eina peningagávu til felagið Sinnisbata; konta í Føroya Sparikassa.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra mamma, omma og langomma okkara

**Malena Fr. Thomsen**
á Tanganum, Hvalba

varð heimkalla sunnumorgunin 26. februar, 90 ára gomul.

Farið verður úr kapellinum á Tvøroyri fríggjadagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Vitninum leygardagin 4. mars kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*
**Poula og Jógvan**

*Tey, ið vilja minnast Malenu, kunnu lata Eldrasambýlinum í Hvalba eina gávu.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæra systir, fastir, abba- og langabbasystir okkara

**Marietta Heinesen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Norðoya Røktarheim.
Takk til prest, organist og kirkjutænarar.
Takk fyri gávur til sjómanskvinnuringin, fyri blómur og kransar og til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Vitalis, Marjun og Poul Jakki**